## -22 (13-7):

# eiga steypið




*Fagnaðurin var ovurstóru og væl skilligur. Triða árið á rað er StÍF steypavinnari. Og við sigrinum hesa ferð vunnu teir steypið til ognar*

*Mynd: Álvur*

**FAKTA**

**StÍF-VÍF 24-22 (13-7)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Alexandur Johansen 11(4), Bent Djurhuus 5, Leivur Justinussen 3, Borgar Danielsen 2, Pauli G. Hansen 2, Bárður Danielsen 1
**VÍF:** Áki Olsen 5, Harald Bjørgvin 5, Regin Joensen 4, Agnar Joensen 3, Sámal Joensen 2, Ingi Olsen 2, John Zachariassen 1
**Brotskøst:** StÍF 5, VÍF 1
**Útvísingar:** StÍF 2, VÍF 4
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen. Høvdu ongar nevniverdugar trupulleikar av einum dysti, sum ongantíð gjørdist so intensur, sum roknast kundi við.

Kanska tí strandingarnir nú eisini spældu meira kontrollerað.

Tað tóktist tó ganga striltið at fáa samband við mótstøðuna aftur, men seinasta korterið tóktist tó gongd at koma á. Frá 18-11 broyttist talvan til 21-18, og nakað av spenningi hómaðist nú í áskoðarafjøldini. Eisini teirri hjá StÍF, sum annars hevði larmað og sungið allan dystin á tamb.

Men alt tóktist kortini rapa, tá bonkurin hjá VÍF framdi eitt mistak. Útskifting varð framd, uttan at spælari var komin út, og so mátti Regin Joensen út á beinkin at sita í tveir minuttir. Ein støða, sum StÍF kanska ikki revsaði so øgiliga hart, men sum meira ella minni punkteraði seinastu vónina hjá VÍF. Og tá júst innskifti Pauli G. Hansen tók sakina í egnar hendur, hóast hann mest skuldi nýtast í verjupartinum, var leyst og liðugt. Við tveimum málum á rað staðfesti hann, at steypið enn einaferð skuldi setast á borðið til ársveitsluna hjá StÍF. Ein ársveitsla, sum við beráddum huga er dagfest neyvt sama dag, sum steypafinalurnar verða spældar.

### Finaluliðið

Strandingarnir kundu har afturímóti staðfesta, at teir fram um øll onnur lið í landinum mugu roknast sum satt finalulið. Ein eginleiki, sum nú hevur ført tríggjar steypasigrar á rað við sær. Og sum kanska eisini kann føra meira enn hetta við sær, tá kappingarárið er liðugt.

Í øllum førum hevur liðið framvegis møguleika at spæla seg í FM-finaluna, har teir í løtuni kappast við VÍF og Kyndil um annað plássið á talvuni. Og megna teir at spæla seg upp millum tey bæði fremstu, so er væl sannlíkt, at teir eisini standa við øllum, tá kappingarárið er av. Eisini hóast hagtølini fyri føroyskan manshondbólt staðfesta, at tað er sera trupult hjá einum liði at vinna sær greipuna. Ein staðfesting, sum kanska man vera størsta troystin hjá VÍF, sum nú bara hevur FM-stríðið at hugsa um.



*Áki G. Olsen helt ikki, at VÍF nakran tíð fekk nakað veruligt tak á dystinum leygardagin*

*Mynd: Álvur*

# Teir eru klárari

**Hóast hann ikki vildi tosa um kompleks, so staðfesti Áki G. Olsen, at strandingum dámar ógvuliga væl at vinna á vestmenningunum**

TAPARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri áskoðaran til steypafinaluna hjá monnum tóktist tað greitt, at vestmenningar als ikki vóru klárir til dystin. At teir onkursvegna hava tapt fyri StÍF somikið ofta, at teir ikki longur trúgva upp á møguleikan.

Og tá vit eftir tapið fingu orðið á Áka G. Olsen, var hetta ein staðfesting, sum hann illa fekk skákað sær undan.

– Eg fái illa nokta fyri, at tað er so. Í øllum førum eru teir nógv meira tendraðir, enn vit eru, og vit fáa ongantíð takið á dystinum. Vit fáa sjálvandi nøkur mál aftur, men tað fært tú aloftast. Tað var í øllum førum ikki so, at vit vóru serliga nær nøkrum sigri nakrantíð.

Nakað annað, sum eisini eyðkennir dystirnar hjá tykkum móti StÍF, er, at Marian altíð tykist hava ein góðan dag móti tykkum. Eru tit onkursvegna bangnir fyri honum?

– Tað var í øllum førum eisini ein munur millum liðini í dag. Vit fáa ikki bóltin fram við honum, og 22 mál eru í øllum førum alt ov lítið. Eg veit ikki, um tú skalt tosa um nakað kompleks í so máta, men vit kunnu so bara staðfesta, at teimum dámar ógvuliga væl at vinna á okkum, segði Áki G. Olsen at enda.

# Ein góður vani

**Hóast fleiri finalusigrar, so sigur Marian Cirloganescu seg enn ikki vera troyttan av heitinum sum steypavinnari**

VINNARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann var aftur hesa ferð í fokus. Marian Cirloganescu var enn eina ferð ein av týdningarmestu spælarunum í eini steypafinalu. Fleiri ferðir vóru tað bjargingar frá honum, sum hildu fjarstøðuna til VÍF í lagi, og hann var eisini skjótur at staðfesta, at honum dámdi væl at spæla móti VÍF.

– Eg royni sjálvandi altíð at gera mítt besta, men tað nú ikki hvørja ferð, at tað riggar. Men tað er sjálvandi stuttligt at spæla ein góðan dyst móti VÍF. Ikki minst, tá talan er um eina finalu.

Men hvussu ber tað til, at tað nærum altíð riggar hjá tær móti VÍF. Eru teir kanska við at verða bangnir fyri tær?

– Eg rokni ikki við, at teir eru bangnir fyri mær. Teir hava væl virðing fyri mær, eins og eg havi virðing fyri teimum. Men kanska dámar mær stílin hjá teimum. Eg plagi at hava gott tak á, um tú sært burtur frá Harald, sum altíð skorar nógv mál móti mær.

– Men tað stutta av tí langa er, at tú altíð skalt fyrireika teg væl. Tað gjørdu vit allir hesaferð, og tað gav eisini úrslit. Vit arbeiddu allir sera væl sum ein eind, og tað haldi eg var avgerandi, staðfesti Marian at enda.



*Venjingin skuldi verið í lagi. Við tryggari hond varð sjampanjan skonkt upp í steypið, sum nú er ogn hjá Marian og hinum spælarunum hjá StÍF*

*Mynd: Álvur*